## Leygardagin 16. apríl kl. 17 (e)

Í sendingini verður vitjað á eini framsýning hjá Mekonomen við Hoyvíksvegin í Havn, har samrøður m.a. eru við Petur Martin Johansen, Heina Haubro og Allan Løfgren frá Mekonomen. Eisini fortelja Anna og Magnus Skýlindal í Kollafirði um internethandilin Matpakkin. fo, umframt at ein elbilur verður royndarkoyrdur saman við Egon Øregaard, stjóra á Tekniska Skúlanum í Tórshavn.


Petur Martin Johansen


Magnus og Anna Skýlindal


Egon Øregaard

2 Vínnu- & bílradío á Rás




NOTA
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

# Leitar tú eftir læruplássi?

Vit sóknast eftir lærlingi til skrivstovuna hjá Skálki í Tórshavn. Her hevur tú møguleikan at arbeiða í bókhaldinum hjá eini spennandi og gevandi fyritøku.

**Vænta verður:**

- At tú hevur FHS- ella HH-prógv
- Hevur hug at útbúgva teg innan skrivstovuyrki
- Hevur áræði og góðan hug at arbeiða við tølum
- Er røkin og álítandi
- Hevur lætt at samstarva við onnur, og ert fyrikomandi

**Bjóða verður:**

- Løn sambært S&K-sáttmála
- Eitt spennandi og trygt arbeiðspláss
- Góðar arbeiðsumstøður

Lærutíðin er 2 til 3 ár, alt eftir útbúgving, og í lærutíðini kemur tú á ymisk skeið á Føroya Handilsskúla. Ein endalig uppgávu verður gjørd í lærutíðini.

Skálkur hevur fleiri handlar, bæði í Tórshavn og Runavík

Er hetta nakað fyri teg, so send okkum skrivliga umsókn við prógvum, møguligum viðmælum og frágreiðing um møguligar royndir.

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 30. apríl og eigur at verða send til:

NOTA
løggilt grannskoðanarvirki p/f

Hoyvíksvegur 5 · Postboks 30 · FO-110 Tórshavn · nota@nota.fo

ÚTBJÓÐING

## Tekniski skúli í Klaksvík, Skúlaheimið

Við hesum verður arbeiðið at skifta tekju á Skúlaheiminum í Klaksvík boðið út í almenna lisitatión.

Arbeiði fevnir í høvuðsheitum um endurnýggjan av útsíðum:
- Nýggja bjálving og klæðing av útsíðum, uppsett á stálgrind
- Nýggj vindeygu
- at bjálva takrúm

Arbeiðið skal gerast í tíðarskeiðinum 06.06 – 15.09.2011 og í juli - august 2012.

Lisitatiónin verður mánadagin 23.05.2011, kl. 14.00 á Tekniska skúla í Klaksvík.

Útbjóðingartilfarið verður bert útflýggjað digitalt, og verður tað sent teimum bjóðandi 02.05.2011.

Bílegging av tilfari fer fram áðrenn 29.04.2011 við at senda teldupost til gugu@lv.fo.

Tá biðið verður um útbjóðingartilfar, skal upplýsast:

- Navn og bústaður á virki.
- Kontaktpersónur og telefonnummar.
- Teldupostadressa.
- Vinnutal.

SENDISTOVAN

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, 110 Tórshavn | Tel. 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land

*Landsverk er ein stovnur undir Innlendismálaráðnum og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvallamál, herundir tyrlupallar.*